UTTANRÍKIS- OG MENTAMÁLARÁÐIÐ

Løgtingið
Tinghúsveg 3
100 Tórshavn

Dagfesting: **28. desember 2020**
Tygara ref.**:**
Máltal.**: 19/00017-109**

Svar

upp á

fyrispurning nr. 52-057/2020 frá Jóhan Eli Lyngvej Poulsen, løgtingsmanni, eftir Tingskipanini § 52 a.

Fyrispurningur um shipping útbúgvingar og dekkara útbúgving, settur landsstýrismanninum í uttanríkis- og mentamálum, Jenis av Rana (at svara skrivliga eftir TS § 52 a)

Fyrispurningurin er soljóðandi:

1. Er nøkur ætlan um at skipa fyri shipping útbúgving í Føroyum?
2. Um ja, hvørjar og undir hvørjum útbúgvingarstovni?
3. Er nøkur ætlan at endurskoða dekkara útbúgvingina (skipsatstøðara)?

Svar

Til 1: Í løtuni eru samanlagt 8 lærlingar undir útbúgving til shipping og speditión, har skúlaparturin verður lisin í Danmark. Á borðinum eru ongar ítøkiligar ætlanir um broytingar, men landsstýrismaðurin vil fegin kanna, um og hvussu henda útbúgving kann verða stað- og raðfest í Føroyum.

Til 2: Sí svar til spurning 1.

Til 3: Dekkaraútbúgvingin er broytt soleiðis, at bæði skúlaskeiðini á 20 vikur eru løgd saman til eitt skeið, áðrenn farið verður undir praktiska partin/sigling. Tosað hevur verið um at gera aðrar broytingar, men onkið ítøkiligt er komið burturúr. Landsstýrismaðurin er tó sinnaður at kanna, um og hvørjar broytingar kunnu gerast fyri at bøta um hesa útbúgving, serliga á teimum økjum, sum spyrjarin vísir á.

Vinarliga

Jenis av Rana
landsstýrismaður